Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jacob Vestergaard, løgtingsmaður

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: ICES-tilmælið um makrel, norðhavssild og svartkjaft fyri 2026

Spurningar:

1. Nær varð Fiskimálaráðið kunnað um ásetingarnar í komandi ICES-tilmælinum um makrel, norðhavssild og svartkjaft fyri 2026?
2. Kunnaði landsstýrismaðurin landsstýrið – Fíggjarmálaráðið – um tilmælið?

Viðmerkingar

Undir 1. viðgerð av løgtingsfíggjarlógini tórsdagin 2. oktobur 2025 vísti undirritaði á, at nýggjastu tilmælini frá ICES um makrel, norðhavssild og svartkjaft ikki vóru tikin við og tí ikki vóru ein partur av lógaruppskotinum.

Støddin á kvotunum av makreli, norðhavssild og svartkjafti fyri 2026 hevur stóran týdning fyri inntøkugrundarlagið hjá landskassanum, og tí undraði tað undirritaða, at hesar upplýsingar ikki vóru tiknar við, nú ICES mælir til munandi skerjingar fyri makrel og svartkjaft.

Sagt varð, at Fiskimálaráðið/landsstýrið ikki visti um tilmælið, fyrrenn tað varð almannakunngjørt 30. september 2025.

Hettar samsvarar ikki við tær royndir, sum undirritaði hevur úr Fiskimálaráðnum, tá Fiskimálaráðið varð kunnað um komandi tilmælið av føroyska umboðnum í arbeiðsbólkinum umleið ein mánað, áðrenn tað varð almannakunngjørt.

Tað bar ikki til at fáa svar frá landsstýrismanninum í Løgtinginum tórsdagin 2. oktobur 2025, tí hann tók ikki orðið. Tí verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

Á Løgtingi 6. oktobur 2025

Jacob Vestergaard